# Much money although no oil

**In the Faroes not a single drop of oil has been produced yet, but this situation has not prevented income from large oil revenues. In total the Faroese society has made app. 200 million kroner directly from the oil industry, since oil exploration efforts begun seven years ago**

OLJUINNTØKUR
*By Hilmar Simonsen*

It pays to explore for oil. This is absolutely clear if you look at the income made by the Faroe society, linked to oil exploration in one way or another. Or more correctly, if we just look at part of these incomes.

An overview compiled by Jarðfeingi shows that during the period from 2000 to the awarding of the first exploration licenses and upto 2006, some of the oil revenues had reached 200 million kroner. In the overview, it is stressed that these are not all the oil revenues, but just some and the period is to end of 2006.

The actual income most probably began in 2001, when drilling started upon the first exploration well in south western part of the Faroe plateau. Drillings continued until 2002, when the last drilling from the first round was completed. Oil revenues however, did not stop there, but did fall somewhat if you study the tax incomes for individuals and companies.

According to the Jarðfeingi overview, incomes from tax and exploration licenses (acreage payments) totalled 19,5 million kroner in 2001, in 2002 they were 22,3 million and during the years 2003 – 2006 between 7 and 9 million. On top of this are duties from the sale of seismic licenses issued to Western Geophysical from 1994-95 gave app. 15 million kroner.

The largest amounts however stem from the support of various industrial competence, which during this period represented 107 million kroner. Of these, 90 million were agreed ultimo 2006, while the remaining 17 million either are or will be agreed sooner or later for various projects.



*In total the Faroese society has made app. 200 million kroner directly from the oil industry*

### No total overview of all the revenues

Mr Petur Joensen, principal at Jarðfeingi told Sosialurin that there are other incomes, for example from Faroe companies working in the oil industry and the taxing of them. However they have not been recorded specially at the Inland Revenue so it is impossible to see and record them.

Neither is there direct or indirect incomes from the Sindri fund, which is a fund established by oil companies in the year 2000, and which objective is to support scientific research within the oil industry, included in the overview. It has to be said that several of these projects are being conducted at foreign institutions and universities, and therefore it is difficult to evaluate how large a part of the money flows through the Faroe economy.

-"Sindri is of a special nature, which possibly can be compared to the work done by the oil companies in connection with the Faroe area. Expenditure of that work is not calculated as an income for the Faroe society. It is all a question of definition", Mr Joensen points out.

He stresses that the overview is only intended to highlight what incomes the various posts in the overview have generated. Therefore we are talking of a minimum amount of 200 million kroner, which the Faroe society has gained from oil exploration. The actual amount is somewhat higher than this.

# Nógvir pengar hóast eingin olja

**Í Føroyum er eingin dropi av olju framleiddur enn. Men tað hevur ikki forðað fyri stórum oljuinntøkum. Tilsamans hevur føroyska samfelagið forvunnið í minsta lagi 200 mió. krónur, ið hava beinleiðis tilknýti til oljuvinnu, síðani gongd kom á oljuleitingina fyri sjey árum síðani**

Tað loysir seg at leita eftir olju.

Tað stendur greitt um vit hyggja eftir teimum inntøkum, sum føroyska samfelagið hevur forvunnið, ið á ein ellan ennan hátt eru knýttar at oljuleiting. Ella rættari sagt, um vit hyggja eftir bert einum parti av hesum inntøkum.

Ein uppgerð hjá Jarðfeingi vísir nevniliga, at í tíðarskeiðnum frá 2000, tá fyrstu leitingarloyvini vórðu givin, og fram til og við 2006 vóru 'nakrar' av oljuinntøkunum komnar upp á 200 mió. krónur. Í uppgerðini verður dentur lagdur á, at talan ikki er um allar oljuinntøkurnar, men um nakrar, og hesar ganga sum sagt fram til endan av 2006.

Tær veruligu inntøkurnar ið muna byrja í 2001 tá farið var at bora fyrstu leitingarbrunnarnar í uttasta landsynningspartinum av føroyska landgrunninum. Hesar hildu á til 2002, tá seinastu boringarnar vórðu gjørdar í tí umfarinum. Men oljuinntøkurnar støðgaðu ikki upp tá, hóast tær minkaðu um hugt verður eftir skattainntøkum frá persónum og feløgum.

Sambært yvirlitinum frá Jarðfeingi vóru inntøkur frá skatti og leitiloyvum (víddargjaldi) tilsamans 19,5 mió. krónur í 2001, í 2002 vóru tær 22,3 mió. krónur, og árini 2003-2006 millum 7 og 9 mió. krónur. Haraftur-at hava avgjøld fyri sølu av seismikkloyvum latin Western Geophysical í 1994-95 givið umleið 15 mió. krónur.

Men størstu upphæddirnar eru komnar umvegis stuðuli til vinnuliga førleikamenning, sum í hesum tíðarskeiðnum vóru tilsamans 107 mió. krónur. Av hesum vóru 90 mió. krónur játtaðar ultimo 2006, meðan eftirverandi 17 mió. krónurnar antin eru, ella verða játtaðar fyrr ella seinni til ymiskar verkætlanir.

### Einki yvirlit yvir allar inntøkur

Petur Joensen, fulltrúði á Jarðfeingi, sigur við Sosialin, at aðrar inntøkur eru eisini, sum til dømis inntøkur hjá føroyskum feløgum, ið hava arbeitt í oljuvinnuni, og skatturin av teimum. Men hvørgar av hesum verða gjørdar serskilt upp í landskassaroknskapinum, og tí ber ikki til at síggja tær serskildar.

Heldur ikki eru beinleiðis, ella óbeinleiðis, inntøkur frá Sindri-grunninum, ið er ein grunnur settur á stovn av oljufeløgunum í 2000, ið hevur til endamáls at stuðla vísindaligari gransking, ið burturav hevur við oljuleiting at gera, við í yvirlitinum. Sigast skal, at fleiri av teimum verkætlanunum ganga fyri seg á útlendskum stovnum og lærdum háskúlum, og tí er ringt at meta um, hvussu stórur partur av teimum pengunum renna ígjøgnum føroyska samfelagsbúskapin.

- Sindri hevur ein serligan karakter, kann kanska samanberast við tað arbeiðið, sum oljufeløgini gera í samband við føroyska økið. Útreiðslurnar av tí arbeiðinum verða vanliga heldur ikki roknaðar sum fíggjarinntøka til føroyska samfelagið. Hetta er alt sjálvandi spurningur um definitión, vísir Petur Joensen á.

Hann leggur dent á, at nevnda uppgerð bara er ætlað at lýsa, hvat júst teir nevndu postarnir í yvirlitinum hava givið av sær peningaliga.

Sostatt er talan um eina minimums upphædd á 200 mió. krónur, sum føroyska samfelagið hevur fingið burtur úr oljuleiting. Veruliga upphæddin liggur helst nakað væl hægri enn hetta.

**Yvirlit yvir nakrar inntøkur til føroyska samfelagið frá oljuvinnuni til og við 2006**

| Tús. kr. | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattur | | | | | | | | |
| Persónar | | 17,351 | 5,761 | 4,025 | 1,477 | 1,412 | 538* | 30,564 |
| Feløg | | | 14,421 | 3,064 | 3,407 | 436 | 1,059* | 22,387 |
| | | | | | | | | 52,971 |
| Víddargjald | 2,107 | 2,107 | 2,107 | 2,107 | 2,107 | 6,028 | 7,120 | 23,683 |
| Avgjald serlig seismikkloyvi[1] | | | | | | | | 15,000 |
| | | | | | | | | * 91,654 |
| Játtað til vinnuliga førleikamenning[2] | | | | | | | | 107,000 |
| | | | | | | | | * 198,654 |

[1] Provisión av søluinntøkum frá seismikkloyvum latin Western Geophysical 1994-1995. Umleið upphædd
[2] Peningurin játtaður (ikki allur brúktur enn) til føroyska førleikamenning. Partvís brúktur uttanlands.

*Kelda: Jarðfeingi 2007*